gult cyan magenta svart



Hendur & Hugflog 2000 — Søluframsýning fyri listhandverk og heimavirking

Vevstovan Mýrifípan:

# Ung men gomul í fakinum

*Hóast Tóra ikki er serliga gomul, so er vevurin henni ikki ókendur. Omman hevði vevstovu, og frá tí Tóra var pinkalítil genta, plagdi hon at vitja inn á gólvið hjá ommuni. Grundin var løgd, og so var tað kanska ikki so løgið, at Tóra tók yvir, tá omman legði frá sær*

*Sveinur Tróndarson*

Hóast ung í fakinum, so hevur Tóra Simonsen kent til vev og veving alt tað, hon kann minnast. Mamman hevði ein vev standandi á loftinum, og hon brúkti manga fríløtuna har uppi. Omman var nú heldur ikki eiðasør, fyri at siga tað, sum tað er.

- Omma vevaði serliga nógv. Hon hevði Vevstovuna, har hon og aðrar konur vevaðu, og har plagdi eg at vitja, frá tí eg var heilt pinkalítil, sigur Tóra.

Í byrjanini var tað mest vitjan, men seinni vaks hugurin fyri fakinum hjá ommuni og frítíðarítrivinum hjá mammuni, og sum tíðin leið, bar alt á tað borðið, at framtíðin hjá Tóru skuldi hava eitthvørt við vevin at gera — og so varð.

**Tók yvir aftaná ommuna**

Hjá ommuni var tað so, at vevurin var annað enn frítíðarítriv. Hon hevði, sum sagt, konur afturat sær í framleiðsluni, og áðrenn long tíð var fráliðin, keypti hon sær ein maskinvev. Hann er størri og nógv øðrvísi enn ein ”vanligur” vevur, og er eisini nógv øðrvísi at handfara.

Men tað var nú ikki bara tað. Omman hevði keypt ein vev, sum tað ikki var pláss fyri í teirra egnu húsum, og tí gjørdu hon og maðurin av at keypa eini størri hús í Stoffalág, og hesi húsini komu at vera karmurin um Vevstovuna framyvir.

Fyrst í 90-unum gjørdu føroyingar avtalu við ES um handil og ein avleiðing av hesi avtaluni var MVG skipanin.

- Tá meldaði omma pass. Hon hevði ikki hug at fara at seta seg inn í MVG-skipanina, og tí heitti hon á meg um at hjálpa sær. Á tann hátt, kom eg enn longur inn í fakið, og tá omma doyði í 1997 tók eg yvir, greiðir Tóra frá.

**Idealisman drívir verkið**

Hóast tað ikki var fremmant fyri Tóru, so var tað kortini ikki bara sum at siga tað at taka yvir. Tað er ikki so nógvur peningur í eini slíkari vinnu, og tí er tað ikki ov nógv sagt, at tað er idealisman, sum drívir verkið.

Tóra hevur ein lítlan son, sum hon ansar sjálv, og tí má arbeiðið lagast til eftir tí. Einsamøll er hon kortini ikki, tí umframt at pápi hennara arbeiðir saman við henni, so er maður hennara heldur ikki eiðasørur at hjálpa til, tá høvið býðst.

- Fyri eini tíð síðani keyptu vit okkum enn ein maskinvev afturat, og við honum ber til at gera fleiri uppgávur, betri og skjótari, sigur Tóra.

Men enn er tað heldur striltið at fáa tað stóra fíggjarliga avkastið av framleiðsluni.

- Tað er nú einaferð so, at okkara framleiðsla er eitt sindur avmarkað sammett við vevstovur uttanlands, og tað er teimum vevstovunum vit kappast ímóti. Tí ber illa til at gera tað sama fyri ein dýrari penga. Vit mugu tí hugsa eitt sindur øðrvísi og gera okkurt, sum hinar vevstovurnar ikki gera, og tað er tað, sum vit royna í løtuni. Eitt dømi eru føroysku skjúrtini, sum fyri tað mesta verða gjørd eins allastaðni. Her hava vit roynt at verið úti um okkum og hugt eftir, hvussu tey gomlu føroysku sniðini sóu út, sigur Tóra, og leggur afturat, at tey hava hugsað sær, at hetta skal gerast ein nýggjur møguleiki hjá teimum.

**Kenda danska matstovan**

Tá tað kanska er eitt sindur trupult hjá Tóru at koma víðari á føroyska marknaðinum, spyrja vit, um tað ikki hevði verið eitt hugskot at farið út um landoddarnar at gjørt vart við seg.

Til hetta svarar Tóra, at hon hevur roynt, og at tað hevur givið misjøvn úrslit.

—Vit royndu okkum í Íslandi, men har kundu vit spart upp á krútið. Vit sendu brøv út til eina rúgvu av møguligum kundum, men fingu ikki eitt einasta svar aftur, greiðir hon frá.

- Hinvegin fingu vit eina áheitan um at gera nakað til eina matstovu í Danmark, og tað er ikki óhugsandi, at júst hetta kann koma at vera ein hornasteinur undir eini framtíð við fleiri útlendskum viðskiftafólkum, greiðir hon frá.

Tóra sigur frá, at ein av matstovunum í kendu ketuni hjá Hereford skuldi hava vovið eitt gólvteppið og tað var gjørt eftir tekning frá Tróndi Paturssyni. Hetta mundi eydnast væl, tí tá tey skuldu brúka tilfar til nakrar benkur, komu tey aftur, og sum skilst á Tóru, er fyritøkan væl nøgd við vøruna frá Tóru.

- Eg havi ikki sæð tað sjálv, men mamma og pápi hava sæð tað, og tey hildu tað vera heimligt at síggja okkara arbeiði liggja á gólvinum, tá tey trinu innar, sigur Tóra smáflennandi.

Sum skilst á henni, so er eisini møguleiki fyri, at Tóra kann sleppa at brúka Hereford í eini »lýsingarherferð« í Danmark og aðrastaðni við. — Vit fáa nakrar myndir frá teimum, og so fáa vit at síggja, sigur Tóra.

**Sjálvlærd**

Sum sagt hevur Tóra slitið sínar barnaskógvar í umhvørvi, har vevur var partur av húsinum. Hon hevur ikki nomið sær útbúgving innan fakið, men hevur fingið góðan stuðul frá ommu og mammu síni.

- Mamma lærdi meg nógv, og tað gjørdi omma eisini. Tær báðar í felag hava lært meg meginpartin av tí, sum eg havi lært, og tí havi eg kanska ikki sæð nakra orsøk til at fara á skúla. Nú skal tað eisini sigast, at tað er stórur munur á at arbeiða við einum vanligum vevi og einum maskinvevi, tí ein maskinvevur krevur nógv meira og øðrvísi handfaring, sigur Tóra.

Kortini hevur hon gingið á kvøldskúla eitt skeið, og tað er so tað.

Sum dømi um munin millum hand- og maskinvevin, sigur Tóra frá, at tey á útlendskum vevstovum hava fólk, sum bara taka sær av at stilla vevirnar, men soleiðis er ikki hjá okkum. — Her mugu vit taka okkum av øllum, og tað er nú heldur ikki so galið, sigur kvinnan, sum hóast unga aldurin er gomul í fakinum _

# Hornini hava tikið yvir

*Sveinur Tróndarson*

*Mitt í nítiárunum teknaði Eyðna Gaard seg til eitt skeið við kvøldskúlan á Fossanesi. Síðani tá hevur hon arbeitt við listhandverki, og hon gerst alsamt meira bitin av tí. Fyrst vóru tað hornini — nú eru hon eisini farin at arbeiða við beini og neytakleyv*

- Nú summarið nærkast er eftirspurningurin sera stórur, og tí siti eg so at siga allan dagin og arbeiði, sigur Eyðna Gaard, úr Klaksvík.

Mitt í nítiárunum teknaði Eyðna seg til eitt kvøldskúlaskeið á Fossanesi, og líka síðani hevur hon arbeitt við hornum meiri ella minni burturav.

**Undangongumenn á Fossanesi**

At hornini so at siga skuldu taka yvir, var kanska ikki ætlanin, tá hon av fyrstan tíð teknaði seg til kvøldskúlan. Men undirvísingin var sera áhugaverd og lærarin góður, og tað var orsøkin til, at hugurin fyri at gera meira við hornarbeiði vaks. Bæði hjá Eyðnu og eisini hjá Jacobinu, sum hon arbeiðir nógv saman við.

- Vit kunnu næstan siga, at kvøldskúlin á Fossanesi er tiltikin fyri sína frálæru í at arbeiða við hornum, og tað hevur ivaleyst eggjað okkum til at halda fram.

Eyðna sigur, at hon skjótt gjørdust bitin av hesum arbeiðinum, og at hetta hevur verið áhaldandi. So við og við er dirvið økt ,og hon er nú eisini farin at gera lutir burtur úr beini og neytakleyv.

Men tað er ikki bara sum at siga tað kortini, tí tað er ein lang prosess, frá tí at hon fær hornini, til tey liggja antin sum ein upptrekkjari ella sum eitt hálsprýði.

- Ja, tað er púra vist, sigur hon og smáflennir, tí tað er ikki altíð so tespiligt at takast við.

**Tolið húsfólk**

Eyðna greiðir frá, at hon fær horn og kleyvar frá fólki, sum vita, at hon arbeiðir við slíkum. Ikki altíð er tað so tespiligt at síggja til, men soleiðis má tað nú einaferð vera, tí hon má sjálv handfara tey og gera tey til.

Í fyrsta umfari verður alt koyrt í eina grýtu, og har vera tað liggjandi nakrar tímar. Slóðin skal loysast frá hornunum, og tað tekur eitt sindur av tíð, um hornini eru í feskara lagi.

- Tá tað er liðugt, skulu tey vaskast væl og virðiliga, tí seyða- ella neytaluktur skal ikki ganga at teimum, greiðir Eyðna frá. — Og ikki fyrr enn reingerðin er liðug, kann eg fara undir at pussa tey og virka tey til tað, sum eg havi sett mær fyri, leggur hon afturat.

Men einki av hesum hevði borið til, um ikki húsfólkið var so tolið, sum tað er, sigur Eyðna. — Onkuntíð haldi eg, at tey ynskja meg har piparið grør, men tað er helst mest, tá hornini eru í ræstara lagi, sigur hon og flennir. — Annars eru tey sera røsk at stuðla mær í tí, eg takist við, leggur hon afturat.

**Serliga til føroyingar**

Tá vit spyrja Eyðnu, hvørji viðskiftafólk hennara eru, sigur hon, at tað serliga eru »útlendskir« føroyingar, sum eru heima á vitjan, ella føroyingar, sum eru á veg uttanlands.

- Føroyingar, sum eru heima og vitja, vilja fegnir hava okkurt føroyskt við sær, tá teir fara avstað aftur. Onnur vilja hava onkran lut við til vertirnar, og tá er okkurt smáprýði úr horni ikki so galið, sigur Eyðna.

Tá vit spyrja um útlendsk viðskiftafólk, er hon næstan eiðasør, sigur hon.

Orsøkin er helst, at hon onga sølubúð hevur í Klaksvík og tað, sum hon selur, verður selt til fólk, sum vita, at hon arbeiðir við slíkum.

- Eg havi — ikki enn í hvussu er — havt hug til at gera mær eina sølubúð, og sum er, havi eg tað ikki fyri neyðini. Eg havi nóg mikið at gera við at framleiða tað, sum eg skal, greiðir hon frá.

Annars heldur hon ikki, at útlendingar eru so áhugaðir í at keypa slíkar smálutir, sum eitt nú upptrekkjara úr horni.

**Ferðast til framsýningar**

Kortini er Eyðna ikki tann, sum goymir seg við sínari framleiðslu norðan fyri Leirvíksfjørð. Hon hevur verið við á nógvum søluframsýningum, og tað ætlar hon sær at halda á við, sigur hon.

- Tað eru so nógvar smáar jólasølustevnur, eitt nú á Oyrabakka og í Runavík, og tað kastar væl av sær, sigur Eyðna. Hon hevur eisini verið við til Hendur og Hugflog øll árini, og eins og við hinum framsýningunum, heldur hon, at tað er nakað, sum gevur meira dirvi og áræði.

- Eg vil ikki siga, at sølan er tann týdningarmiklasti parturin av at vera við til eina framsýning. Hinvegin haldi eg, at vit stuðla hvørjum øðrum øgiliga væl, og tað er sera týdningarmikið, tá ein tekst við slíkt. Tað er skjótt, at ein kemur at sita einsamallur, og tí er gott at fara út at sýna fram, sigur Eyðna, sum samstundis heldur, at tað er neyðugt at hava okkurt nýtt við sær í skjáttuni at vísa fram.

Tá vit spyrja Eydnu, um hon so hevur gjørt nakað nýtt hesaferð, dregur hon eitt sindur, men kemur so eftir, at tað hevur hon.

- Eitt horn, sum er sagað sundur, og sum er ein upptrekkjari í øðrum endanum og ein propptrekkjari í hinum. Tað havi eg ikki sæð nakran annan gjørt, sigur hon.

Hesin lutur fæst eins og aðrir bæði í pussaðari útgávu og eini meira ráari útgávu.

- Tað skal vera eitt sindur at velja ímillum, og øllum dámar ikki, tá tað er polerað, sigur hon.

**Hugurin er til meira**

Hóast tað er mikið putlut at takast við handaverk av slíkum slagi, so er hugurin til arbeiðið ikki fánaður — heldur tvørturímóti.

Sum sagt, er hon eisini farin at arbeiða við neytakleyv og beini, men umframt tað er hon eisini farin at arbeiða við silvuri. Burtur úr tí ger hon ringar og hálsketur, og tað er ikki óhugsandi, at annað legst til við árunum.

- Tað verða brúktir nógvir tímar, serliga tá summarið er, og eftirspurningurin er stórur. Tá alt pussiarbeiðið verður gjørt við handamegi, so tekur tað sína tíð, men tað er sera hugaligt, sigur Eyðna at enda.

gult cyan magenta svart



Hendur & Hugflog 2000 — Søluframsýning fyri listhandverk og heimavirking

# Forkunnugir gestaframsýnarar úr grannalondunum

*Tað er nú vorðin fastur táttur at hava útlendskar gestaframsýnarar við á søluframsýningini Hendur & Hugflog. Í ár koma spennandi gestaframsýnarar - nú bæði úr Íslandi og Hetlandi*

*Sveinur Tróndarson*

Sjálvt um Hendur & Hugflog er ætlað føroyskum listhandverkarum, so hava royndirnar frá teimum báðum seinastu árunum víst, at tað er rætt at bjóða útlendskum starvsfeløgum við.

Seinastu tvey árini hava útlendskir gestaframsýnarar verið við, og umframt at geva hesum møguleika at sýna sínar vørur fram, so gevur hetta eisini føroysku framsýnarunum møguleika at síggja, hvat starvsfelagar teirra - og kappingarneytar - hava at bjóða.

Í ár koma fyri fyrstu ferð gestaframsýnararnir úr bæði Íslandi og Hetlandi.



*Gríman er úr Hetlandi og hana hevur Journeyman Leather greitt úr hondum*

**Prýðislutir úr Hetlandi**

Úr Hetlandi koma umboð fyri tvær fyritøkur, har onnur virkar lutir úr leðri, meðan hin ger prýðislutir.

Hjá Shetland Jewellery gera tey prýðislutir. Her er talan um bæði hálsprýði og aðrar prýðislutir, og felags fyri teir allar er, at teir antin eru gjørdir úr sterling silvuri ella gulli. Sniðið, sum Shetland Jewellery arbeiðir eftir í løtuni, eitur »The Glasgow Girls« og íblásturin til hetta sniðið kemur frá nøkrum sermerktum skotskum kvinnum, sum høvdu ein stóran leiklut, tá stílurin sum fekk navnið »The Glasgow Style«, varð til.

Herumframt ger Shetland Jewellery eisini ringar. Her hava serliga giftiringarnir fingið góða móttøku, og fyritøkan selir giftiringar kring allan heim.

Shetland Jewellery hevur sølubúð í Lerwick, men verkstaðurin liggur í Weisdale, einar 15 til 20 kilometrar vestan fyri Lerwick.

**Hágóðskaðar leðurvørur**

Journeyman Leather virkar lutir úr leðri. Ein partur av framleiðsluni er tilfar, sum reiðfólk hava brúk fyri. Fyritøkan ger bæði grímur og saðlar, so her fáa føroysk rossafólk høvi til at gleða hestin, nú beint undan Ólavsøkuni.

Journeyman Leather sigur á heimasíðu síni, at teir gera grímur til øll ross. Teir hava fleiri ross á garðinum, og tað gevur teimum góðar møguleikar at passa grímurnar til, áðrenn tær vera lætnar.

Umframt grímur og saðlar ger fyritøkan eisini taskur, belti og reimar. Alt verður tilevnað úr leðri og skyggjandi lutirnir eru gjørdir úr messing. Fyritøkan liggur í Sandness á vestursíðuni av Shetland Mainland.

**List og prýði úr Íslandi**

Gestaframsýnararnir úr Íslandi eru Elínborg Kjartansdóttir og Anna Gunnarsdóttir.

Elinborg Kjartansdóttir er kend listakvinna í Íslandi og hevur arbeitt við málmlist og handaverki síðani 1989. Hon starvaðist eitt skeið fyri Oasis í Bretlandi, og har virkaði hon m.a. skartgripir úr kopari og messingi.

Seinastu árini hevur hon tikist mest við myndalist og hevur havt egnar framsýningar. Herumframt hevur hon eisini luttikið á altjóða framsýningum, eitt nú í Bretlandi. Í 1999 hevði hon egna framsýning undir heitinum »Kennist tú við«, har allir persónarnir á myndini vóru kendir íslendingar.

Anna Gunnarsdóttir er av Akureyri og ger lutir úr leðri. Hon ger millum annað taskur og lampur úr leðri. Eisini hon er kend víða fyri sítt handaverk.



*Elinborg Kjartansdóttir er málmlistakvinna úr Íslandi og hennara verk vera at síggja á framsýningini um vikuskiftið*

*Anna Gunnarsdóttir úr Íslandi framleiðir lampur, taskur og aðrar lutir úr leåri*



# Summarvindur

Vindurin kemur úr fjaldum goymslum, kannar og sær alt, sum hann friðleysur reikar í ymsar ættir. Tað ágrýtna lagið er á honum, ferðin er í ein útnyrðing og skjótt liggja norðurhøv fyri framman, illfýsin av blástri hansara. Í havsbrúnni ballar tokan seg um okkurt grønt og grátt, ið siglir í bláum. Vindurin harkar, er lúnutur, men forvitin, orkar ikki stilli og mjørka. Hostar - burtur við honum. Í einum eygnabragdi sæst, at tað grøna og tað gráa, ið siglir í tí bláa eru oyggjar.

Vindurin missir nærum ondina av hesi undursjón, men kvaklast við aftur, tá hann niðri í eini møl hómar okkurt, sum eina reyða pirru, tita aftur og fram. Eisini letur ljóð úr lítlu pirruni. Hann makar vindin, kemur nærri og sær, at lítla reyða pirran er ein smágenta í hvítum øklasokkum og reyðum kjóla. Hon hoppar og dansar skinklandi klett av kletti, og tað hon sigur er: »malagrót, mala- malagrót.« Tað er so stuttligt at siga malagrót, mala- malagrót og uppaftur stuttligari er at taka malagrót, teir smáu steinarnar, upp í lógvan, merkja tað runda, kalda grótið og kenna hvussu væl tað fellur í hondini.

Vindurin heldur, at smágentan er so yndislig, hann kann ikki bara sær at kína henni um annan kjálkan, men tað verður nakað harðligt, gentan kulsar og rennur heim í hitan.

Innkomin rættir hon út hondina og spyr tivandi: »Babba, hvør hevur gjørt malagrótið?« »Tað er havið, ið hevur myndað malagrótið, uppgangur í túsund, túsund ár,« svarar pápin. Gluggin stendur á gloppi og vindurin slotar í nánd, lurtar. Aftur spyr smágentan: »Babba, dugi eg at gera okkurt, sum er so vakurt sum malagrót?« Pápin hugsar seg væl um, áðrenn hann svarar: »Lítla mín, okkurt kynstur manst tú duga, og í mínum eygum verður tað tú gert, eins vakurt og malagrót.« »Men hvussu skal eg bera meg at?« spyr gentubarnið ótolið. Tolið ljóðar svarið: »Tú eigur tvær hendur, tvey eygu, tvey oyru og inni í fitta høvdi tínum búgva spurningar og í kenslum tínum búgva ampin og gleðin!«

Lotið kennist inn í stovuna, sum vindurin toyggir seg at hoyra hvørt orð. Sorgblíður hugsar hann fyri sær: »Hóast alla megi mína fái eg onki havt á hondum. Vil eg skunda mær eftir onkrum, fer tað undan mær, royni eg at lyfta onkrum, dettur tað niður aftur. Eydnuríkt er mannabarnið í reyðum kjóla at geva og fáa.

»Babba, fara vit út í bøin nú?«, spyr smágentan í reyðum kjóla. »Ja, nú er góður hoyterri, vindurin er vælsignaður, viðhvørt.«

Smoykin smeyg vindurin sær útum aftur í ein landsynning.

**Summarsólstøður 2000**
**Randi S. Vang**